Nøvn




# Heimaforbundið í Havn 80 ár

**Leygardagin 11. desember verður Heimaforbundið hjá Frelsunarherinum 80 ár.**




*Slagorðið er: Kristus inn í hvørt eitt heim*

Tann 11. desember 1930 var Heimaforbundið stovnað í Tórshavn. Fyrstu leiðararnir vóru Lena Christiansen og Margretha Carlsen og vóru tær leiðarar í 5 ár.

Tað vóru nógvar kvinnur sum komu saman hvørt hóskvøld kl. 20, tær hugnaðu sær við handarbeiði av ymiskum slagi, og fingu ein drekkamunn, umframt alt arbeiðið í Frelsunarherinum, so var eisini andakt, og vóru tað offiserarnir sum høvdu ábyrgdina har.

Í 1935 tóku Maria Olsen og Rasmina Kjærbo við leiðsluni, og høvdu tær ábyrgdina í meiri enn 30 ár.

Undir heimsbardaganum gjørdi Heimaforbundið eitt stórt hjálpararbeiði, bundu pløgg og gingu út í hús at hjálpa, nógvar familjur høvdu sjómenn, so tað var nógvur ótryggleiki undir heimsbardaganum, so var gott at fáa vitjan av eini Heimaforbundssystir.

Eisini varð nógv bundið og bleiv sent til Noregs, serliga Norðurnoregs, tað fór ígjøgnum Reyða Kross og kom takkarbræv aftur frá Noreg.

Maria Olsen og Rasmina Kjærbo arbeiddu væl saman, eisini høvdu tær stóra umsorgan fyri systrunum sum komu á Heimaforbund. Í 1960 fóru tær frá vegna aldur.

Tá var tað Olga Højgaard og Kirstin Joensen sum tóku við. Tað hava altíð samlast nógvar kvinnur til møtini og í 50'unum var serliga væl vitjað.

1968 tók Kirstin so leiðsluna saman við Sofíu Jacobsen og Amalie Olsen. Í 1971 bleiv Amalie leiðari og Sofía Jacobsen og Johanna Clementsen,

Birthe Lena hjálpti og var hon tann sum stóð fyri skemtinum, so sum upplestur, sketsjir, mótaframsýningum ja, nógv kundi hon finna uppá. Í 1993 er Sofía blivin leiðari og Karinbeth Petersen og Irena Christiansen. Ninna Holm var eisini eina tíð kassameistari, til hon flutti suður aftur til Vágs og helt fram sum leiðari í Heimaforbundinum har, tá tók Inger Hansen við sum kassameistari.

Í 2006 tók Inger við leiðsluni og Karinbeth helt fram sum varaleiðari, Marianna Højgaard sum kassameistari.

Á møtunum er ofta ymisk evnir og tá verður roynt at fáa onkran útifrá at hava tey. Einaferð um árið er Árasølu, tað er burturluting og fer allur peningurin til korpsarbeiðið.

Missiónskvøld er eisini eina ferð um árið, og seinastu ferðirnar hevur verið “”Syngið-við-kvøld” við fullsettum sali og hava tey eydnast avbera væl. Peningurin sum kemur inn fer til ymisk lond, sum øll Heimaforbund í Noreg, Íslandi og Føroyum eru saman um.

Útferðir hava verið í nógv ár, heimaforbundsystrarnar hava verið busstúrar og so verður farið inn á eina matstovu at fáa ein góðan døgurða. T.d.: hava tær verið í Fuglafirði, við Gjógv, Tjørnuvík, Vestmanna, í Vágum, Leynum, Hósvík, Klaksvík, Viðareiði og Sandoy, kanska okkurt er gloymt men vit hava verið víða um.

Tey seinasti árini eru busstúrarnir blivnir til kvinnustevnur, har tær hava verið saman eitt vikuskifti og eisini havt vitjan úr Noreg, sum hava leitt og talað. Tá eru kvinnur úr Suðuroy eisini við og tær havt góðar stevnur. Tvær ella tríggjar stevnur hava eisini verið í Suðuroy.

Tann fyrsta stevnan var í Runavík, so hava tær verið í Nesvík, Øravík og seinasta ár á Hotel Eiði, ið var ein væleydnað stevna.

Nakrar systrar hava verið á stevnu í Noreg á Gejlo og Jeloya. Eisini hevur onkur verið á skeið í Noreg.

Heimaforbundið hevur nakrar góðar limir, sum eru aktivar og villigar at hjálpa til á ymiskan hátt og vit ynskja Guds signing fyri komandi tíðir.

Leygardagin 11. desember verður Heimaforbundið 80 ár, og veitsla verður hildin fyri limum og avvarðandi við døgurða o.ø. í Frelsunarherinum og koma Brit Knedal, oberstloytn., úr Noreg, og úr Íslandi kemur Margaret S. Marit, majorur at vera saman um hátíðardagin. Sunnudagin kl. 11 og kl. 18 koma tær at tala á møtunum, har øll eru hjartaliga vælkomin.